Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Endurnýtslustøðir

Spurningar:

1. Hevur landsstýrið - saman við kommunum og vinnuni - ætlanir um at skipa endurnýtslustøðir, ið hjálpa vinnuni at endurnýta tilfar, sum verður blakað burtur í dag?
2. Um ja, nær verður klárt at nýta endurnýtslustøðirnar?

Viðmerkingar:
Tað er komið fram í miðlunum, at nógv gott tilfar hjá vinnuni fer burtur, tí umstøður eru ikki at endurnýta. Eitt nú snýr tað seg um byggitilfar, men sannlíkt er, at aðrar vinnur eisini kunnu nýta nýggjar og størri endurnýtslustøðir.

Endurnýtslan hjá Dugna er eitt dømi um eitt væl eydnað átak, har lutir og innbúgv hjá húsarhaldum verða endurnýtt, tá húsarhaldini ikki hava tørv á teimum longur. Í løtuni eru fá líknandi alternativ til vinnuliga endurnýtslu.

Tað hevur nógv at siga fyri umhvørvið, at vit leingja um livitíðina á virðismiklum tilfeingi við at endurnýta tað. Endurnýtsla sparir okkum øllum tíð, tilfar, orku og pening. Eisini kann hetta vera við til at eggja fyritøkum at leggja sítt virksemi um til at brúka endurnýtt tilfar, tí tað er ofta einki galið við tilfarinum, ið verður beint burtur.

Umstøðurnar at endurnýta kunnu tískil blíva nógv betri hjá bæði borgarum og vinnuni. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 27. apríl 2022

Ingilín D. Strøm